

## Keypa á markinum

Svenskir handilsmenn, sum hava fingið sær handil við norska markið, hava jól og góðar dagar. Ikki færri enn 50 handlar eru nú svensku megin markið, og teir hava úr at gera við at avgreiða øll tey norsku viðskiftafólkini, sum koma eystur um markið at keypa. Ein nýggj uppgerð vísir, at tá tað snýr seg um landbúnaðarvørur og matvørur yvirhøvur, er marknahandilin størri enn tann skrásetti, svenski útflutningurin til Noregs.

## Verkfrøðiheim

Tveir danskir grunnar, Villum Kann Rasmussen Fonden og A.P.Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal, hava játtað 40 mió. krónur til at byggja eitt nýtt næmingaheim til verkfrøðiskúlan í Sisimiut í Grønlandi. Tað eru nøkur ár, síðani verkfrøðiskúlin har byrjaði, men næmingatilgongdin hevur verið darvað av vantandi bústaðarviðurskiftum. Tann trupulleikin verður loystur við nýggja heiminum.

*(Kelda: www.industry.fo)*

# – Fólk keypir ikki klæði men upplivingar



*F.v. Sarah Musgrove, Wendy Scott og Hilary Riva og hinar við pallborðið hildu føroysku søguna vera áhugaverda*

*mynd: nud*

**Boðini frá umboðunum fyri mótaídnaðin í London hildu føroysku søguna vera somikið áhugaverda, at hon kundi selt føroysku sniðini.**

FUNKY FAROE ISLANDS

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tiltakið "At Fóta Sær Í London", ið Menningarstovan skipaði umfataði m.a. pallborðsfundin "A Small Fish In A Big Pond", har evnið um hvussu ein lítil føroyskur sniðgevi, kann klára seg á stóra altjóða marknaðinum, varð umrøtt.

Pallborðið var mannað av kendum og virdum andlitum í mótaídnaðinum í Bretlandi: Sniðgevanum Susan Brackhouse, ið sjálv hevur roynt at byrja egið virkið og hevur fingið virkið at yvirliva eisini eftir tey fyrstu árini. Hilary Riva, ið umframt at vera forkvinna í British Fashion Council hevur arbeitt við klædnasølu í eitt mannaminnið, Melanie Winning, ið er stylistur og make-up artistur og hevur arbeitt nógv í mótavinnuni, Sarah Musgrove, ið er strategiskur ráðgevi, og livur av at marknaðarføra sniðgevar og antropologinum, mótablaðkvinnuni og sniðgevanum av hundafrakkum Wendy Scott, sum eisini hevði skipað fyri hesum partinum av tiltakinum.

Drúgvu og umfatandi royndirnar hjá pallborðsluttakarunum gjørdu fundin sera áhugaverdan. Talan var um fimm luttakarar, ið einki serligt kendu til Føroyar ella føroyskan móta, men nógv av ráðunum, snúðu seg um hvussu tú fótar tær í mótavinnuni í London.

Pallborðsluttakararnir tyktust á einum máli um, at skalt tú klára teg innan mótaídnaðin, so krevst at fíggjarligu og handilsligu partarnir av tínum virksemi verða væl røktir. Skalt tú hava fígging til nakað sum helst, krevjast fíggjarætlanir og virkisætlanir, ið grundgeva fyri tínum virki. Hesi evnið hava nógvir sniðgevar ikki og í tílíkum førum, er ofta gott at fáa sær ein samstarvsfelaga, ið kann røkja hesar uppgávur.

- Skalt tú fáa eitt virki at bera seg, er neyðugt, at tú megnar at halda kundan nøgdan, hetta merkir t.d., at tú skalt kunna levera vøruna í øllum støddum og litum, tá onkur bíleggur hana, at tú skal halda avtalur, og vera til at lýta á, segði Hilary Riva.

Susan Brackhouse vísti á, at hetta tó bert var galdandi, um tú ætlaði tær at liva av tínum sniðum. Hon vísti á eitt dømi, har hon hevði luttikið á einum verkstaðið fyri sniðgevar. Tey sótu og góvu hvør øðrum ráð um, hvussu tey skuldu reka síni virkir. Tá tey fóru at tosa um sølu av sínum klæðum, meldaði tann kendasti sniðgevin teirra millum pass. Tí hóast hann var eitt stórt navn í mótaídnaðinum og hansara snið vóru á catwalkinum á størstu mótamessunum, so hevði hann ongantíð selt somikið sum eitt einasta plagg. Her var tað navnið og umdømið, ið vóru avgerandi.

- Tað er júst hetta sum er munurin á list og handilsligum virksemið, viðmerkti Hilary Riva.

Skalt tú reka eitt virkið er eisini sølufremjan av sera stórum týdningi. Susan Brackhouse segði, at sjálvt miðal snið kunnu verða seld, um bert sølufremjandi arbeiðið er nóg gott, meðan bestu sniðgevarnir kundu detta niður ímillum, um marknaðarføringin ikki var nóg góð. Sarah Mushgrove, ið til dagliga starvast sum PR fólk hjá Versace, segði, at vit ikki máttu gloyma hvussu góð okkara søga er.

- Hvaðani ert tú frá? Hetta er ein av teimum fyrstu spurningunum, ið tú tú spyrt onkran, og tit eru úr einum landi, ið flestu fólk einki vita um, ja, tey vita ikki hvar landið liggur. Tað er tað sermerkta, ið er lættast at selja, og tykkara søga er sera sermerkt, segði Sarah Musgrove.

Tað er í veruleikanum lættari at gera vart við teg í London, sum føroyingur enn, um tú ert úr onkrum lítlum enskum býi.

- Fólk keypir ikki klæði men upplivingar, tey keypa hvussu tey kenna seg í tínum klæðum, og her eru søgurnar týdningarmiklar segði Sarah Musgrove. Hon greiddi frá, at hon var sjálv úr New Foundlandi, og tí var hon uppvaksin við at binda.

Tað er nógv sál er í binding, og um man kann fáa fram hvussu kensluborið hetta var, og samstundis geva tí ein modernaðan vinkul, so hevði hetta verið sera gott stoff, segði háttvirda PR konan.

# Tað er áhugavert at seta pening í vinnur við útflutningspotentiali

**Stjórin í Framtaksgrunninum var væl nøgdur við ráðstevnuna "At Fóta Sær Í London", ið gav honum innlit í vinnur, ið hann nærum onga vitan hevði um frammanundan**

FUNKY FAROE ISLANDS

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Niels Dann West stjóri í Framtaksgrunninum var millum luttakararnar á føroysku ráðstevnuni At Fóta Sær í London í farnu viku. Hann sigur við Sosialin, at hann fekk nógv burtur úr túrinum í London.

- Tað var ikki torført hjá mær at læra nakað um mentanarligar vinnur sum tónleik og móta, tí eg hevði so óalmindiliga avmarkaða vitan um hetta áðrenn ferðina, sigur Niels Dann West og heldur fram

- Eitt sum yvirraskaði meg var, at tað sum fakfólki við pallborðið legði dent á, at tú skalt leggja fram fyri fíggingarstovnum og øðrum íleggjarum er businessplanir og grundgivnar ætlanir, júst eins og í øllum øðrum fyritøkum. Hetta er gott fyri okkum, tí tá er lættari hjá okkum sum íleggjara at fyrihalda okkum til fyritøkur og teirra virksemi.

Á ferðini vóru eisini fleiri vinnurekandi innan bæði mótaídnaðin og tónleikin, vit spurdu Niels Dann West, um nakrar konkretar samrøður høvdu verið við nøkur av hesum virkjum.

- Eg hevði nøkur áhugaverd prát við nakrar av luttakarunum, sigur hann. Hann vísir á, at higartil hevur framtaksgrunnurin bert sett pening í føroyskar verkætlanir, og hetta kann vera eitt sindur avmarkandi um virkið er skrásett uttanlands. Men hetta merkir ikki, at okkurt av virkseminum hjá virkinum ikki kann vera uttanlands. Vit vilja fegin leggja pening í vinnur við útflutningspotentiali.

Á ráðstevnuni vóru pallborðsfundir, framløgur og eitt PR tiltak. Niels Dann West sigur, at hann heldur at fyriskipanin tyktist væl úr hondum greidd, har var í øllum førum einki, ið hann dugdi at seta ein prikk á.

- Eg haldi tað er eitt gott hugskot at Menningarstovan fer undir tílík tiltøk, tí um tú skalt út á altjóða marknaðin við tónleiki og móta, so vildi eg mett, at tað er munandi lættari at fáa fatur á rætta fólkinum í London, enn at fáa tey øll til Føroyar. Tó havi eg ikki førleika at meta um, júst London er rætta staðið ella ei.